# Strandatáttur yngri

Gevið ljóð og lýðið á,
*under så grøn en lide,*
nakað veit eg at fortelja frá.
*Kongen af Danmark lader det hævne.*

2. Fyrr fóru vit inn á Strendur at berjast,
nú sigast strandingar allir at semjast.

3. Í bygdaráðnum er semjan best,
har kradda teir til sín allir sum mest.

4. Bartal situr í formanssessi,
og samstundis stýrir hann Pihl og Essi.

5. Á Heygsstøðni sprongja teir ofta við krúti,
har Jógvan Fredersiksberg er fúti.

6. Pidda Johansen eg ikki skal lasta,
men hjá kommunalinum hevur hann tað fasta.

7. John Rasmussen situr eisini har,
tí fær hann SEV-ið at tendra hjá mær.

8. Hetta er onki skálkaskjúl,
men hví er onki til Berint Juel?

9. Spyr meg ikki um hvat og hvørjar,
men Berint stýrir jú Esso Føroyar.

10. Jú, menninir fimm í kommununi sita,
um hvat teir gera, skalt tú ikki gita.

11. Eg minnist tey gomlu orðini nú:
At gitir tú, so lýgur tú.

12. Í fáum orðum er søgan hendan,
at ongin av teimum vil standa við endan.

13. Í ráðum er tó neyvan bert prát,
tí sóknin hevur hyl til hvønn bát.

14. Í Strandatátti var konan fromm,
og spáddi, at bardagin var ein skomm.

15. Satt segði Bartals kona tað,
og næsti táttur er yrktur í dag.

15. Nú skal lætta ljóðið av,
tá Vøttur hjá Grana for undir kav.

16. Hetta nýggja há og spott,
tað kalla vit yngra Strandatátt.

Jógvan Arge yrkti 2. mars 1974.